

Kom inn
Góðan dag
Vælkomin og HURRA

# - vit eru klár!

Vælkomin til móttøku
4. juni kl. 10.00
á Fornminnissavninum
í Brekkutúni 6

Tíðin

Samleikin

## Kom til móttøku 4. juni kl. 10.00 á Fornminnisavninum í Brekkutúni 6

# Klár við...

- **nýggjari framsýning um søgu okkara**
- **serframsýning um sjórænarar og kristnar trælir**
- **nýggjum tilboði til skúlar**
- **nýggjari heimasíðu**

Kom og síggj lutir úr víkingatíð og miðøld, sum fornfrøðingar hava grivið út.

Lutir úr 17., 18. og 19. øld, tá ið handilssamskiftið við umheimin var skipað við kongligum einahandli. Lutir frá tíðini kring aldaskiftið 1800, tá nýbrot hendi í føroyskum mentanarlívi, fólk fóru at gera skrásetingar av náttúru, nýggjar listagreinir mentust og áhugi birtist fyri handverkslist, málningalist og ljóðføristónleiki.

## Svabos spælimenn

spæla løg úr nótabókini hjá Jens Chr. Svabo frá 1775.



Nótabókin er sýnd fram, og eisini fiólir, sum Nólsoyar Páll, ið livdi í somu tíð, hevur átt.




## Nýggj heimasíða

**www.fornminni.fo**

Hvat ger Fornminnissavnið? Finnið upplýsingar um fjøltáttaða virksemið, t.d. um framsýningar, tiltøk, friðing og mangt annað.

**Nýtt leitiamboð**
Hvussu sá heimbygdin út, tá omma var lítil? Roynið spennandi leitiskipanina “savn“.

# Nýggj skúlastova -ein arbeiðshola til børnini

Í hjartanum á framsýningini er gjørd ein verkstova, har skúlar og onnur hava høvi at arbeiða við søguni.

Fornminnissavnið ynskir at geva børnunum góðar arbeiðs-umstøður, tí tað eru tey, sum skulu bera mentanararvin víðari.

Vit vóna, at foreldur, lærarar og onnur fara at taka væl ímóti hesum tilboði og hjálpa okkum at skapa spennandi og mennandi upplivingar fyri børnini.

Vælkomin í arbeiðsholuna á fornminnissavninum!



# UPPLIVIÐ MENTANARSØGU OKKARA

Stephanssons Hús

## SKRÁ

Svabos spælimenn

Andras Mortensen, landsantikvarur, bjóðar vælkomin

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum

Børn í Hoyvíkar skúla leggja fram

Svabos spælimenn

## Upplatingartíðir:

Framsýningarnar í Brekkutúni 6 og á Hoyvíksgarði:
Frá 15. mai til 15. sep.
Mánadag til fríggjadag kl. 10-17
Vikuskifti og halgidagar kl. 14-17

Vaksin kr.30,-
Børn undir 16 ár og skúlaflokkar ókeypis

www.fornminni.fo · Kúrdalsvegur 2 · P.O. Box 1155 · FO-110 Tórshavn · Tel. +298 31 07 00

**FØROYA FORNMINNISSAVN**